umhvørvisstovan

# GÓÐKENNING

Við heimild í kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 um góðkenning av virkjum, sum framleiða, umvæla og endurnýggja pakkitilfar, plattar o.a. úr viði, góðkennir Umhvørvisstovan við hesum:

| | |
|---|---|
| Navn á virki við góðkenning: | |
| **Verkstaðurin á Brekku** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Á Brekku 31, 700 Klaksvík | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| At framleiða pakkitilfar, plattar o.a. úr hitaviðgjørdum viði | |
| V-tal: | Góðkenning nr.: |
| 404802 | FO 003 HT |
| Galdandi frá: | Galdandi til: |
| 06-09-2022 | 05-09-2025 |
| Mál nr.: | |
| 22/01239-4 | |

Argir, hin 6. september 2022

K H Jensen

Katrin Haraldsdóttir Jensen, deildarleiðari

Rakul Mortensen

Rakul Mortensen, málsviðgeri

## 1. Heimild

Henda góðkenning at framleiða, umvæla og endurnýggja pakkitilfar, plattar o.a. úr viði er givin við heimild í § 2, stk. 1 í kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 um góðkenning av virkjum, sum framleiða, umvæla og endurnýggja pakkitilfar, plattar o.a. úr viði.

Sambært International Standard for Phytosanitary Measures No. 15 (ISPM No. 15, Regulation of wood packaging material in international trade, 2018, kapittul 4.3), hava myndugleikarnir í framleiðaralandinum ábyrgd av at tryggja og prógva, at pakkitilfar verður framleitt sambært treytunum í standardinum. Standardurin er partur av reglunum undir International Plant Protection Convention (IPPC).

Sambært § 3 í kunngerð nr. 72 frá 2013 kann Umhvørvisstovan seta treytir og sambært § 4 hevur Umhvørvisstovan eftirlit við, at ásetingar í kunngerðini og góðkenningini verða hildnar. Krav til mannagongdir eru settar í góðkenningartreytunum.

## 2. Umsókn

Verkstaðurin á Brekku undir Almannaverkinum fekk góðkenning til at framleiða plattar tann 22. februar 2016. Góðkenningar til framleiðslu av plattum eru tíðaravmarkaðar og tí skal virkið søkja um endurgóðkenning triðja hvørt ár. Hin 17. august 2022 fekk Umhvørvisstovan umsókn um endurgóðkenning til framhaldandi at framleiða plattar úr hitaviðgjørdum viði. Umhvørvisstovan var á vitjan 24. august 2022.

## 3. Lýsing av virkseminum

Virkið fær hitaviðgjørt[1] og avbarkað timbur frá Sp/F Atlantshav, sum hevur góðkenning til at handfara hitaviðgjørt timbur sambært IPPC og ISPM No. 15.

Framleiðslan er í leigaðum hølum á Brekku 31, 700 Klaksvík. Framleiðslan er innandura, meðan goymslurnar eru uttandura. Plattarnir verða seldir til virkir í Føroyum.

Verkstaðið á Brekku er eind undir Trivnaðartænastuni, sum er partur av Almannaverkinum. Framleiðslan av plattum verður útint av brúkarum, ið hava serligar avbjóðingar. Starvsfólkini á verkstaðnum hava ábyrgdina av eftirlitinum við framleiðsluni, stuðla undir upplæring, fylgja við og eftirkanna, at framleiðslan er í lagi o.s.fr.

Framleiðslan av plattum fer fram í fimm stigum:

[1] *Viður, sum heilt ígjøgnum í minst 30 samanhangandi minuttir er hitaður til í minsta lagi 56 °C, ISPM No. 15*

1) Plankar verða kubbaðir í klossar/kubbar
2) Kubbar verða skotnir í brettir (tríggir kubbar í hvørt bretti).
3) Brettir til sjálvan plattin verða sett saman.
4) Kubbarnir verða settir undir plattin.
5) Merking fer fram við at brenna í tveir teir mittastu kubbarnar á hvør sínari síðu á plattinum

Plattarnir verða síðani savnaðir, bundir saman og settir á uppmerktum øki úti.

Virkið framleiðir upp til 100 einnýtisplattar um dagin. Plattarnir verða seldir til tvey virkir í Føroyum.

Verkstaðurin á Brekku hevur mannagongdir fyri at skjalprógva hitaviðgerð, framleiðslu og merking av plattum, upplæring av starvsfólk og frávik í framleiðsluni.

## 4. Málsviðgerð

Grundarlag undir málsviðgerðini eru hesi skjøl:

1. Umsókn um endurgóðkenning frá 17. august 2022
2. Lov nr. 370 af 21. december 1938 for Færøerne om bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr
3. Kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 um góðkenning av virkjum, sum framleiða, umvæla og endurnýggja pakkitilfar, plattar o.a. úr viði
4. International Plant Protection Convention (IPPC)
5. ISPM No. 15, Regulation of wood packaging material in international trade, 2018
6. Vegleiðing nr. 15/2014 hjá Umhvørvisstovuni: Vegleiðing til virki, sum framleiða ella umvæla pakning, plattar o.a. úr innfluttum, viðgjørdum viði (hereftir nevnd Plattavegleiðingin[2])
7. Vitjan á staðnum hin 24. august 2022
8. Samskifti við virkið

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á skjalprógv fyri hitaviðgerð, merking av framleiddum eindum, mannagongdir og góðskustýring.

[2] https://www.us.fo/Default.aspx?ID=13988

# 5. Góðkenningartreytir

Góðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

## 5.1. Almennar treytir

5.1.1. Hendan góðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

5.1.2. Góðkenningin er galdandi fyri goymsluhøll, framleiðsluhøll og uttanduraøkir, sum virkið ræður yvir.

5.1.3. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 7 dagar eftir at broytingin er framd.

5.1.4. Framleiðslan skal lúka treytirnar í IPPC og ISPM No. 15, umframt Plattavegleiðingini frá 2014. Tó er tað altíð seinasta útgáva av ISPM No. 15, sum er galdandi.

5.1.5. Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum.

5.1.6. Umsókn um endurnýgging av hesi góðkenning skal vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi tríggjar mánaðir fyri, at henda góðkenning gongur út. Henda góðkenning er galdandi til 5. september 2025.

## 5.2. Innrætting og rakstur

5.2.1. Framleiðslan sambært hesi góðkenning skal verða soleiðis, at treytirnar í henni altíð verða hildnar.

5.2.2. Alt økið, sum henda góðkenning viðvíkur, skal vera væl skipað og ruddiligt, og merkt soleiðis at óviðkomandi ikki hava atgongd.

5.2.3. Bert timbur, sum er viðgjørt sambært ISPM No. 15, kann nýtast til framleiðslu og umvæling av pakkieindum.

5.2.4. Skjalprógv fyri timbur til framleiðsluna skal í minsta lagi lúka treytirnar sambært ISPM No. 15 og Plattavegleiðingini.

5.2.5. Allar framleiddar, umvældar og endurnýggjaðar pakkieindir skulu merkjast sambært ISPM No. 15 og Plattavegleiðingini.

## 5.3. Mannagongdir og innaneftirlit

5.3.1. Verkstaðurin á Brekku skal í minsta lagi hava skrivligar mannagongdir fyri hvørt av niðanfyri nevndu punktunum, sum tryggja:

- at tað bert verður brúkt timbur til framleiðsluna, sum er viðgjørt sambært ISPM no. 15, Annex 1 og hevur neyðug skjalprógv (Plattavegleiðingin)

- at viðgjørt timbur trygt verður hildið burtur frá óviðgjørdum timbri, tá tað verður flutt aðra staðni, í sambandi við framleiðsluna á virkinum og á goymslu.
- at pakkieindir verða merktar eftir ásetingunum í ISPM no. 15, Annex 2
- at møguligir feilir í framleiðsluni vera staðfestir og rættaðir.
- at møgulig staðfesting av skordýrum o. ø. verður skrásett, fráboðað og kannað.
- at góðkendar mannagongdir verða hildnar, og at tær regluliga verða kannaðar og møguliga broyttar.
- at verandi og nýggj starvsfólk, sum røkja uppgávur í sambandi við framleiðslu av viðgjørdum timbri, verða upplærd og sett inn í galdandi mannagongdir.

5.3.2. Verkstaðurin á Brekku eftirmetir mannagongdirnar í 5.3.1. regluliga, og í minsta lagi eina ferð um árið. Skoðanin skal skrásetast.

5.3.3. Steðgar framleiðslan í meira enn fýra vikur, skulu allar viðkomandi mannagongdir gjøgnumgangast, tá framleiðslan verður tikin uppaftur. Gjøgnumgongdin skal skrásetast.

5.3.4. Umhvørvisstovan kann í serligum førum krevja broytingar í mannagongdum ella aðrar mannagongdir enn tær, nevndar eru í 5.3.1.

5.3.5. Mannagongdirnar til 5.3.1. og møgulig ískoyti skulu altíð vera til skjals á framleiðslustaðnum hjá virkinum.

## 5.4. Rakstarskráseting

5.4.1. Verkstaðurin á Brekku skal hava eina skrásetingarskipan, sum eftirlitsmyndugleikin kann góðtaka.

5.4.2. Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Navn, bústað og góðkenningarnummar hjá veitarum
- Avrit av góðkenningarskjølum hjá veitarum
- Øll handilsskjøl, sum virkið fær í samband við innflutning av viðgjørdum timbri
- Øll skjøl, sum verða brúkt í sambandi við pkt. 5.3.1 til 5.3.3.

5.4.3. Rakstrarskrásetingarnar skulu goymast í 5 ár og eftirlitsmyndugleikin skal til eina og hvørja tíð kunna síggja tær.

## 5.5. Eftirlit

5.5.1. Umhvørvisstovan kann koma á móttøkustað, har vørueindir verða uppskipaðar, at eftirkanna vøru, merking og skjalprógv.

5.5.2. Umhvørvisstovan skal til eina og hvørja tíð kunna kanna skjalprógv fyri innflutningi, viðgerð og merking á virkinum.

5.5.3. Umhvørvisstovan góðskuskoðar allar mannagongdirnar, sum eru viðkvæmar fyri skjalprógving og framleiðslu av pakkieindum saman við viðkomandi ábyrgdar-starvsfólki á virkinum regluliga, tó í mesta lagi tvær ferðir um árið.

## 6. Afturtøka av góðkenning

Sambært § 5 í Kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 kann Umhvørvisstovan taka góðkenningina aftur, um Verkstaðurin á Brekku ikki lýkur treytirnar í hesi góðkenning.

## 7. Kæra

Henda góðkenning kann sambært §6 í kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, at avgerðin er móttikin. Kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum síðani sendir hana til landsstýrismannin í umhvørvismálum við skjølunum í málinum.